# Fundarbók hjá Eysturkommunu ________/________ Síða
# 520 Leirvík

**Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig, skr.**

## Býráðsfundur mánadagin 28. november 2016 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00367**<br>**Losjan 85 ár**<br>Felagskapurin Losjan glotti fyllir 85 ár. Bygningurin er 80 ár, og fólk vita at sjónleikur er fyrstu ferð spældur í Gøtu fyri 90 árum.<br><br>Mentanarnevndin mælir til at Losjan Glotti fær 85.000,00 kr. í gávu til pall-listina.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at geva eina gávu á 50.000,00. kr. Fíggjarnevndin heitir samstundis á mentanarnevndina, um at gera leiðreglur fyri nær tílíkar gávur verða givnar. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Hanna Jensen.<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Tollakur Joensen |
| 2. | **14/00243**<br>**Neystini á Oyrini í Norðragøtu matr. nr. 75c, d og e.**<br>Uppskot til endurgjald fyri neystinin fyriliggur.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til endurgjald.<br><br>Peningurin verður tikið av konto 6.22.11.510 *(Byggibúning, løgujáttan)* | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |
| 3. | **16/00007**<br>**Nýggjur dagstovnur í Eysturkommunu**<br>Arbeiðsbólkurin sum var settur til at gera eina frágreiðing um verandi stovn og eina komandi útbygging, hevur gjørt frágreiðing.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hja trivnaðarnevndini.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 28. november 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

**4. 16/00390**

**Umsókn um keyp av lendi, matr. nr. 301 í Leirvík**

Umsókn er móttikin frá borgara sum hevur keypt eini eldri hús og hevur ætlan um at byggja nýtt sethús á stykkið, matrikul nr. 300 í Leirvík.

Tá ið matr. nr. 300 einans er 184 $m^2$ til støddar, er umsókn send til Eysturkommunu um at keypa ein part av matr. nr. 301 sum er ogn hjá kommununi og uml. 8 $m^2$ til støddar.

Byggi- og býarkskipanarnevndini mælir til at selja uml. 8 $m^2$ av matr. nr. 301 at leggja til matr. nr. 300.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**5. 14/00265**

**Umsókn um loyvi til at seta flótianlegg upp í bátahylinum undir Gøtueiði**

Verkætlanin er bjóða út til 4 fyritøkur, men bert ein fyritøka hevur givið tilboð uppá arbeiðið.

Um arbeiðið skal gerast og tikið verður av innkomna tilboðnum, verður neyðugt við eykajáttan á 100.000,00 kr.

Vinnunevndin mælir til at taka av fyriliggjandi tilboðið og at veita eykajáttan á 100.000 til verkætlanina.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

Peningurin verður tikin av konto 7.38.14.511
*(Havnir og lendingar, løgujáttan)*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 28. november 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

**6. 16/00315**

**Fíggjarætlan 2017**

Uppskot til fíggjarætlan fyriliggur.

Einmælt samtykt at undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan.

**Høvuðstølini eru hesi:**

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur: | 76.560.000,00 |
| Rentuútreiðslur: | 1.340.000,00 |
| Útr. til rentustuðul: | 1.500.000,00 |
| Inntøkur: | 93.550.000,00 |
| (harav 15.7 mió. er afturbering frá landinum) | |
| Avdráttir: | 5.283.000,00 |
| Íløgur: | 40.790.000,00 |

Skattaprosentið verður óbroytt 21.

Barnafrádrátturin hækkar frá 5.000,00 til 7.500,00 kr.

Mánaðrgjaldið fyri at hava børn á stovni lækkar við 200,00 kr. fyri hvørt barnið.

Avlopið av rakstrinum er 17 mió. kr. Samlaða úrslitið eftir rentir, avdráttir og íløgur verður eitt hall á kr.31,9 mió kr., sum umframt av rakstraravlopinum, verður fíggjað av innistandandi og við lántøku á 10. mió. kr.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

## Býráðsfundur mánadagin 28. november 2016 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

## Fundurin lokin kl. 21.15

Hanna Jensen ____________________________________________

Árni Jacobsen ____________________________________________